## Sveinur og Jan døma

Tá SÍ og Mjølnir leygardagin klokkan 15.30 spæla triðju og avgerandi FM-finaluna í Eik-liguni, verða tað altjóða dómarin, Jan Hentze, og Sveinur Tróndarson, ið døma dystin. Teir báðir dømdu eisini annan finaludystin millum liðini á Eiði, tá Sveinur avloysti Tummas Óla Mortensen, ið annars dømdi tann fyrsta leygardagin, men ikki fekk hildið fram sunnudagin fyri skaða í knænum.



## Stjørnan kann taka FM

Annar FM-finaludysturin í Sunset-kappingini í hondbólti verður í KÍ-høllini í Klaksvík í kvøld, tá Stjørnan tekur ímóti Tjaldri. Stjørnan vann týskvøldið ein knúsandi 31-17 sigur á Tjaldri, og alt talar fyri, at Stjørnan er so mikið stórur favorittur undan aðru finaluni, at klaksvíkskvinnur í kvøld kunnu vinna aftur og harvið taka føroyameistaraheitið. Vinnur Tjaldur, skal alt avgerast leygardagin.

# Ikki leyst og liðugt enn

**– At føroyskir svimjarar sleppa undan karantenu í eitt ár, um teir skulu við til OL, er bara fyrsta stigið á leiðini. Nú skulu vit fáa eina rammuavtalu um, hvussu farast skal víðari, sigur forsetin í ÍSF, Petur Elias Petersen**

einslistir@kallnet.fo



**Hilmar Jan Hansen**

Í vikuni kunngjørdu ÍSF og Svimjisambandið, at fingin er av vegnum størsta forðingin fyri, at føroyskir svimjarar kunnu kappast í olympisku leikunum fyri Danmark, uttan at teir kortini missa rættin til at kappast fyri Føroyar í øllum øðrum altjóða kappingum.

Pál Joensen, sum í løtuni er einasti aktuelli føroyski svimjarin í hesum høpi, er fegin um, at karantenan er fingin av vegnum, tí fyri hann hevur tað alt at siga.

– At koma við til OL, er bara fyri kappingina skyld og ikki fyri at umboða nakran, sum í hesum føri Danmark. Eg eri føroyingur og vil helst av øllum umboða Føroyar, men tá tað ikki er ein realistiskur møguleiki júst nú, eri eg fegin um, at aðrir møguleikar eru. Men so vítt eg veit, er einki enn avtalað við danska svimjilandsliðið um hetta, sigur hann.

Tað vil siga, at skal tað vera til nakra nyttu, at størsta forðingin er av vegnum, so mugu dyrnar eisini latast upp fyri, at danskarar veruliga vilja hava ein føroying við. Og tað er ein samráðingarspurningur, sum arbeitt verður við í løtuni.

### Fáa rammuavtalu

Petur Elias Petersen, ÍSF-forseti, væntar ikki, at tað verður nakrar trupulleiki at fáa formligu viðurskiftini upp á pláss, so Pál Joensen kann sleppa við til OL.

– Eg vil siga tað soleiðis, at tað skal vera løgið, um danska olympiska nevndin, sum nú hevur hjálpt okkum til eina loysn, ið altjóða svimjisambandið hevur góðkent, ikki eisini er sinnað at taka stigið víðari, so eitt nú Pál kann sleppa við til OL, um hann annars klárar kravtíðir og tað, sum skal til, sigur hann.

– Vit skulu nú tosa víðari um, hvussu vit fáa gjørt eina rammuavtalu millum føroysku og donsku olympisku nevndina. Tá hon er komin upp á pláss, er bara tað eftir, sum skal loysast millum sersambondini í Føroyum og Danmark, so semja fæst um, hvør leistur skal brúkast.

Gongd er í málinum, tí eitt umboð fyri donsku olympisku nevndina kemur til Føroya síðst í komandi mánaði, og tá vónar og væntar Petur Elias Petersen, at góði og positivi dialogurin kann halda fram, so semja skjótast gjørligt fæst um, hvussu praktiski parturin verður avgreiddur.



**– Tað skal vera løgið, um danska olympiska nevndin, sum nú hevur hjálpt okkum til eina loysn, ið altjóða svimjisambandið hevur góðkent, ikki eisini er sinnað at taka stigið víðari, sigur Petur Elias Petersen, ÍSF-forseti**



# Flogbóltssambandið vil víðka

**Stendur tað til Flogbóltssambandið, verður Eik-ligan hjá bæði kvinnum og monnum víðkað næsta kappingarár, so kvinnurnar hjá KÍF ikki flyta niður kortini, umframt at menninir hjá TB flyta upp**

Avgerðin um, hvussu nógv lið skulu vera í teimum báðum bestu flogbóltsdeildinum, verður tikin á aðalfundinum hjá Flogbóltssambandinum, sum verður leygardagin 18. apríl. Men longu nú er greitt, at nevndin í Flogbóltssambandinum er samd um eitt tilmæli til, hvussu stórar deildirnar skulu vera.

– Nevndin er samd um at mæla komandi aðalfundinum til at víðka Eik-liguna hjá kvinnum upp í átta lið og hjá monnum upp til fimm lið, so pláss verður fyri ávikavist KÍF og TB, sigur Magnus Tausen, formaður í Flogbóltssambandinum.

– Vit fara at spyrja bæði KÍF og TB, um feløgini vilja hava pláss í Eik-liguni, og so fara vit at mæla feløgunum til at samtykkja á aðalfundinum, at deildirnar verða víðkaðar og kappingarnar tillagaðar samsvarandi hesum.

Serliga sær Magnus Tausen ein vanda í, at KÍF skal niður í næstbestu deildina at spæla, tí hann sær eina avgerandi menning í flogbóltinum í Kollafirði.

– Um KÍF-kvinnurnar noyðast niður í 1. deild, er tað eitt bakkast fyri flogbóltin í Kollafirði, sum heilt greitt hevur eitt potentiali, ið fær tankarnar at leita aftur til SÍ fyri nøkrum árum síðani. Og hygg so eftir, hvar SÍ-kvinnurnar eru í dag, staðfestir formaðurin í Flogbóltssambandinum.

– Eisini TB hevur fingið gongd á menningina á manssíðuni, tí vit síggja fleiri góð dreingjalið har suðuri, so ein uppflyting kann koma at hava avgerandi týdning fyri framhaldandi menningina, umframt at tað má koma væl við, at manskappingin verður størri enn bara fýra lið. Um vit víðka deildirnar, fáa vit eisini yvir alt landið eina størri breidd, sum bara kann vera ein vinningur fyri flogbóltin sum heild.

**hil**

**– Flogbólturin í Kollafirði hevur heilt greitt eitt potentiali, ið fær tankarnar at leita aftur til SÍ fyri nøkrum árum síðani, sigur formaðurin í Flogbóltssambandinum, Magnus Tausen**

Mynd: Hilmar Jan Hansen/Einslistir